# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Theodor Haraldsen 90 ár



Týsdagin 3 januar fyllur Theodor Haraldsen úr Sandavági 90 ár.

Hann var føddur 3. januar 1916. Pápin var Tummas Alexandur Haraldsen úr Sandavági (f.1884 – d. 1928) Mamman var Anna Sofía Haraldsen úr Miðvági ( f. 1887 – d. 1918)

Tey fingu 5 børn: Ludvig, Turid, Hendrik, Herborg og Theodor.

Í dag eru bert Herborg, sum fylti 92 ár beint fyri jól, og Theodor á lívi.

Theodor var bara 2 ára gamal tá ið mamma hansara doyði og 12 ára gamal tá pápin doyði.

Theodor var av raskastu sjómonnum. Hann fór til skips sum 14 ára gamal við Vestmanna sluppini Neptun. Hann var við fleiri skipum, eitt nú Friman, Venus og Kúrberg. Hann sigldi mest sum lastamaður, uml. 60 ára gamal gavst hann sum sjóðmaður, tá var hann kokkur umborð á Kúrberg.

Tá ið Thodor legðist heima, arbeiddi hann hjá Sandavágs kommunu.

Theodor giftist við Onnu Haraldsen, fødd Thomasen . Tey fluttu inn sum nygift í nýggj hús omanfyri Lonar 1960. Theodor hevði latið húsini bygt, har sum barnaheimið hjá honum hevði verið.

Theodor og Anna fingu trý børn. Alis sum býr í Havn, Tummas sum býr í Aarhus og Nomi sum býr í Hoyvík. Tey eiga 6 abba- og ommubørn og 5 langabba- og langommubørn.

Theodor hevur altíð dáma væl at fingist við seyð, dunnur og at verið á flotið. Eisini hevur hann stóran áhuga í politikki.

Góði abbi. Vit hava nógv gott at minnast aftur á, hjá tær og ommu i Sandavági. Hvørja skúlaferiu brúktu vit hjá tykkum. Tit eru altið blíð og tíð at koma inn á gólvið hjá og varta upp við tí allar besta.

Takk fyri alt sum tit hava verið og eru fyri okkum. Vit elska tykkum.

Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Abbabørnini**

Marin Strøm, Keypmannahavn:

## Kandidatur í fólkaheilsufrøði



Marin Strøm úr Vestmanna, búsitandi í Keypmannahavn, hevur í august í ár tikið prógv sum kandidatur í fólkaheilsufrøði frá Institut for folkesundhedsvidenskab við lærda háskúlan í Keypmannahavn.

Marin heldur fram sum Phd. lesandi á Statens Seruminstitut. Evnið er heilsuárin av fiski, m.a. um tað at eta fisk kann verja móti burðartunglyndi og hjarta- og æðrasjúku.

Hetta er ein 3 ára granskingarverkætlan, sum m.a. verður stuðlað úr føroyskum granskingargrunnum. Marin er við í einum granskingarliði á Serum-instituttinum undir leiðslu av Sjúrði Olsen, professara. Tey vóru í november og vitjaðu á Harward í Boston, har tey løgdu fram um teirra granskingarverkætlanir, sum stórur áhugi er fyri har.

### 80 ára føðingardagur

Týsdagin 3. januar verður Herluf Jacobsen, Oyggjarvegur, Havn, 80 ár.

Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymsan hátt heiðraðu meg á seksti ára degnum, takki eg hjartaliga.

Blíðar heilsur og gott nýggjár

**Frits**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**




Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo

†

## Andlát og jarðarferðir

**Beinir Holm**, Tvøroyri, andaðist nýggjársaftan, 76 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin klokkan 18.00. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju hósdagin klokkan 13.00.

Kistan við **Aslaj Nielsen** í Sandavági fer av ellisheiminum í Miðvági mánakvøldið klokkan 18 í Sandavágs kirkju. Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju týsdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Aslaj, kunnu lata Ellisheiminum í Vágum eina gávu, konto í Føroya Sparikassa.

**Edith Mårtenson**, fødd Vang, ættað úr Hvalba, andaðist í heiminum í Dragør 29. desember, 81 ára gomul. Jarðarferðin verður úr StoreMagleby kirke týsdagin 3. januar kl. 13.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góði beiggi okkara

**Hilmar Heinesen**
Tórshavn

andaðist 31. desember, 61 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum hósdagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Emmy, Heini og Birgit**

## Tøkk

Tøkk fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Karin Joensen**
úr Fuglafirði

doyði og varð jarðað.

Hjartans tøkk til tykkum á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi fyri tykkara stóru umsorgan fyri henni meðan hon var har.

*Vegna familjuna*
**Rigmor, Kaj Eli og Charles**

### Dagurin í morgin

**3. januar. Enokur**, sum gjørdist 365 ára gamal (1. Mós., 5,21-24). Navnið merkir vígdur ella royndur.